Jól í Orkis

Jólastovan hjá Orkis letur upp
sunnudagin 18. november kl. 15.00 - 20.00
**Vælkomin inn á gólvið**

Orkis
Glyvrar - Tel 448289

TALENT®
*Spælið har øll kunnu vera við!*




**TALENT** er eitt hugnaligt og læruríkt spæl, har hin klóki, hin snildi og hin hepni loysa ymiskar uppgávur og svara góðum spurningum. Kveikt av bíbliskum vísdómi skulu talentirnar ikki goymast burtur, men koma til sín fulla rætt.

JÓLAGÁVAN TIL ALLA FAMILJUNA

Hús til sølu | Bátur til sølu | Lýsing

## Virkisbygningur á havnalagnum í Kollafirði til sølu

Hesin bygningurin verður seldur um nøktandi boð fæst!

- **Stað:** Kollafjørður
- **Gólvvídd:** 1600 m²



Áhugaði kunnu venda sær til heimasíðu okkara:

- **Heimasíða:** www.rannteld.com

har nærri upplýsingar um prís o.a. fáast.



bókhaldsvirkið Rann Teld

Bókhald
Fakturering
Skuldararøkt
Ognararøkt
MVG-uppgerðir
Skattauppgerðir
Rakstrarætlan
Fyrisiting
Lønar og hýruavrokningar
Ársroknskapir

tlf. 31 89 03 - fax 31 87 03 - M. Heinasonargøta 23 - postboks 205 - 110 Tórshavn

# So upprann dagurin – Badmintonhøllin letur upp



So upprann dagurin – leygardagin 17. nov. 2007 letur nýggja og snotiliga Badmintonhøllin í Klaksvík upp.

Eftir at svimjihøllin og KÍ-høllin nú í áleið 30 ár hava staðið saman, fáa tær endiliga ein nýggjan ítróttargranna – tann vakra og rúmliga badmintonhøllin.

KÍ-høllin varð tikin í nýtslu seint í 60-unum og svimjihøllin fyrst í 70-unum. Báðar vóru tær fyrstar í landinum av sínum slag, so hetta er eitt søguligt øki í føroyskum ítróttahøpi.

Í nógv ár hevur eftirspurningurin eftir KÍ-høllini verið so stórur, at ein høll afturat munar kanska bert lutvíst til tørvin.

Aðrastaðni verða hallir sum tær frammanfyrinevndu bygdar undir eini lon og kallaðar ítróttar- og frítíðardeplar. Hesin møguleiki liggur nú opin – Tí er at fegnast um, at býráðið longu hevur tikið stig til eina sambygging.

Henda er sum skilst bert byrjanin av eini størri heild, sum um nøkur ár knýtir allar tríggjar hallirnar saman við einum áhugaverdum og umráðandi bygningi við alskyns hølum og møguleikum.

Men nú fyrst Badmintonhøllin, sum eitt umráðandi stig inn í framtíðina, letur upp komandi leygardag, heilsa vit henni vælkomnari og ynskja tillukku!

Kl 14.00 lata dyrnar upp.

Á lepanum við hópin av tiltøkum, sum eru á skránni henda dagin, stendur millum annað:

*Pentagon spælir

*Jákup Anthoniussen bjóðar vælkomin

*Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri, Jógvan á Lakjuni og landsstýrismaður í mentamálum - siga nøkur orð

*Klaksvíkar Hornorkestur, Contry-bólkurin, KFUM-kórið, Kvartettin í Betesda og Vitin syngja og spæla.

*Eisini verður eitt minni borðhald og sjálvandi verður onkur serligur badmintondystur.

*Og møguliga koma TrøllaPætur og TrøllaOmman á vitjan.

Okkurt annað spennandi, sum ikki er nevnt her, verður eisini skránni.

Vælkomin í Badmintonhøllin leygardagin 17. nov. 2007 – kl. 14.00